

## Nógv ferðslubrot í Suðuroynni

Væl mannaða ferðslupolitiið hevur í dag koyrt runt í Suðuroynni, og fleiri bilførarar hava fingið klipp í koyrikortið. Tíðliga í morgun fór ferðslupolitiið til verka í Suðuroynni, og úrslitið var fleiri klipp. Mest vanliga brotið er, at fólk inni binda børnini í trygdarbelti í bilinum. Men bilførarar sjálvir vóru ikki allir íbundnir, summir høvdu ikki koyrikortið hjá sær, og onkur koyrdi við tokuljósum.

# Nústaðni sleppa tey í e



*Ein næmingur hevur longu sett seg við sítt borð. Hann fær nú møguleika at nema sær kunnleika ið kann føra hann út úr fátækradøminum*
*Mynd: Sigurd Lamhauge*

**- Umstøðurnar hjá lærarum og næmingum í Tanzania kunnu als ikki sammetast við tær í Føroyum. Her ger sjálvt tann minsta hjálpin góðan mun, sigur havnarmaðurin Sigurd Lamhauge, sum í hesum døgum er við í eini skúlaverkætlan í Tanzania**

MENNINGARSAMSTARV

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Dar es Salaam:** - Tey hava snøgt sagt einki her, staðfestir Sigurd Lamhauge.

Í vetur fekk hann ein heilt serliga uppgávu. Henda miðaði eftir at fáa útbúnað av alskyns slagi til ein skúla, sum liggur fáar kilometrar frá tanzaniska høvuðsstaðnum, Dar es Salaam.

Seinastu 14 dagarnar hevur hann verið á skúlanum, fyri at tryggja sær, at øll útgerðin kom á rætta pláss, varð uppsett og at lærararnir duga at brúka útgerðina, sum er fingin til vega.

Hann er nú komin so langt við uppgávu sínari, at seinasta hondin verður løgd á verkætlanina fyrrapartin og seinnapartin í dag.

Í morgin fer hann avstað og kemur til Føroyar sunnudagin, og fer til arbeiðis mánadagin.

- Henda vitjanin í Tanzania hevur víst mær, hvussu nógv ið lítið hevur at siga, og hvussu stórt gagn, ið sjálvt tann minsta hjálpin kann gera.

- Ja, tey eru ovurfegin fyri sjálvt ta minstu gávuna, men hvussu er tað við okkum? Eru vit nøgd við tað sum vit hava her í okkara landi?, spyr havnamaðurin, sum Rás2 tosaði við í morgun.

Tað var ein lítil kristin samkoma í hesum muslimskt merkta landinum, sum í síni tíð byrjaði skúlan. Í fjør vendi felagsskapurin, ið rekur skúlan sær til Uttanríkisráðið um at fáa borð, stólar og annan útbúnað til skúlan.

- Tú kanst ikki ímynda tær, hvussu glaðir teir 70 næmingarnir vóru, tá borðini og stólarnir vórðu sett upp í flokshølunum. Slíkt má ein bara uppliva.

### Minka fátækradømið

Verkætlanin, sum nú er um at verða liðug, er partur av tí arbeiðinum, sum føroyska Uttanríkisráðið ger í menningarsamstarvi sínum.

Henda ítøkiliga verkætlanin byrjaði í fjør, tá felagsskapurin MYODA í Tanzania vendi sær til Uttanríkisráðið við fyrispurninginum um hjálp.

Felagsskapurin "Mkuza Youth Development Association" - stytt: MYODA - hevur til endamál at minka um fátækradømið millum tey ungu í Tanzania. Felagsskapurin, ið er ein ikki-stjórnarfelagsskapur, gevur eisini ráðgeving, veiti hjálp til íverksetan, útbúgving um hiv/aids og innan vinnulívið.

Henda umsóknin frá MYODA, sum byrjaði við skúlanum í 2004, varð viðgjørd við vælvild í Uttanríkisráðnum, og næsta stigið varð at lýsa eftir einum samskipara at standa fyri verkætlanini. Sigurd Lamhauge søkti og varð síðani settur at loysa hesa uppgávuna.

Sjálvur hevur hann áhuga í viðurskiftunum í øðrum londum, m.a. í triðja heiminum, og hevur hann eisini havt við Suðuramerika at gera í síni tíð.

Í hesum førinum var uppgávan stutt, ítøkilig og greið: At fáa til vega borð, stólar og aðra útgerð til henda skúlan, sum liggur í einum forstaði til høvuðsstaðin.

### 70 næmingar

Hetta er kortini ikki fyrstu